# Hoyringsskriv

**Vísandi til løgtingsmál nr. 149/2019: uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um matstovuvirksemi og gistingarhúsvirksemi (Matstovulógin) (hereftir nevnt lógaruppskotið)**

Undirritaðu umboð fyri matstovur, barrir og náttklubbar (hereftir undirritaðu) hava fylgjandi viðmerkingar til omanfyri nevnda lógaruppskot:

Í fyrsta lagi, hava umboðini ongar viðmerkingar, men er hetta treytað av:

at áseting verður sett inn í lógaruppskotið, sum heimilar undirritaðu fult endurgjald fyri mistar inntøkur, um heimildin verður brúkt til at skerja virksemi hjá undirritaðu og

at gildistíðin verður stytt niður til 31. August 2020

Um omanfyri nevndu ásetingar ikki verða settar inn í lógaruppskotið, so eru fylgjandi viðmerkingar til lógaruppskotið:

Fyrst skal sigast, undirritaðu umboð hava tikið coronatilmælini í sera stórum álvara og hava mestsum fylgt tilmælunum allan vegin. Hetta vístu undirritaðu eisini við, at tá ið tilmælini komu hin 12. mars 2020, so valdu undirritaðu fyrst at skerja virksemi við at steingja kl. 22, sum var í samsvar við tilmælini og eftirfylgjandi at lukkað heilt; hetta fyri at forða fyri smittuspjaðing av Covid-19. Tá undirritaðu valdu at lukka virksemi niður, vóru millum 10-15 staðfestir smittutilburðir í Føroyum.

Síðst í apríl ella um 6 vikur eftir, at undirritaðu frívilliga høvdu niðurlagt virksemi, valdu undirritaðu at lata upp aftur og at hava longri opið enn til kl. 22, sum tilmælini annars løgdu upp til. Sigast skal, at tá ið undirritaðu valdu at opnað aftur, vóru millum 1-5 fólk smittað við Covid-19. So statt bíðaðu undirritaðu við at opnað, til tilmælini høvdu tænt sínum endamálið, sum var at basa smittuspjaðing.

Tá ið undirritaðu valdu at lata upp aftur, var samfelagið eisini byrjað at opna aftur og hvørt vikuskiftið kundi lesast í miðlunum um, at heimaveitslur høvdu verið osfr. og tá ið veitslur kundu vera og bert 1-5 fólk vóru smittaði, so kundu undirritaðu ikki síggja endamálið við at hava lukkað longur.

Í verandi løtu, hava undirritaðu sjálvboðið valt at lukka virksemi kl. 02 í vikuskiftinum, hóast loyvi er at hava opið til kl. 04. Hetta er sjálvandi ein dyggur fíggjarligur smeitur, men verður hetta gjørt, fyri at vísa ábyrgd, við at lukkað niður, áðrenn fólk gerast ov drukkin, soleiðis, at tilmælini um frástøðu og smittufyribirging kunnu haldast. Í núverandi løtu er ætlanin eisini at hava opið til kl. 02.

Nú er latið upp fyri útlendskum ferðafólki, so støðan kann broytast skjott og sigast skal, at um so er at covid-19 aftur kemur til Føroya, so ætla undirritaðu at taka hetta í størsta álvara og fylgja tilmælunum, sum verða ásett, hetta so leingi, sum tilmælini eru proportional við støðuna í landinum.

Ætlanin við lógaruppskotinum, er selektivt at fara inn og fáa heimild til at avmarka eina vinnugrein, hóast heimild ikki verður útvega, til at avmarka aðrar vinnugreinar, sum eisini viðføra smittuvanda. Hetta meta vit vera ósakligt og tí verður mett, at undirritaðu hava rætt til fult endurgjald fyri mistar inntøkur, um lógarheimildin verður viðtikin og brúkt til at skerja virksemi hjá einstakari vinnugrein.

Vísandi til omanfyri nevnda, skal hervið boðast frá, at undirritaðu staðiliga mótmæla, at lógaruppskotið verður samtykt.

Tórshavn, hin: 16.06.2020

____________________
GLITNIR / IRISH PUB

____________________
Texhill / HB

____________________
Basecamp / Taboo

____________________
BassaH / Loca

____________________
Jómfrúbakkin

____________________
SIRKUS FÖROYAR

____________________
Luux

____________________